– Vit bæði arbeiða so nógv, at vit hava nærum ikki tíð. Tí hava vit eitt nú flatskermar í flestu rúmunum, so vit kunnu hyggja í sjónvarp, meðan vit gera onnur ting, greiðir Mariann frá.



## Tráðleyst el

Enn eru vit ikki komin ígjøgnum øll húsini. Vit fara úr aftur stovuni, inn gjøgnum køkin, út aftur í gongina og oman ígjøgnum trappurnar. Við endan av trappuni traðka vit inn í eitt fitness-rúm við bæði vektbonki, krosstrenara, boksipútu og bóltum. Og sjálvandi hongur ein flatskermur eisini í hesum rúminum.

– Her brúki eg nógva tíð, sigur Mariann, og her kann eg eisini hyggja eftir aerobicdvd ella televarpinum, meðan eg treni. Tað er fantastiskt!

Næst fitnessrúminum hevur Mariann sítt egna solarium. Í einum rúmi pent pyntað við tveimum stólum við pyntupútum og kámum ljósi stendur eitt solarium, sum Mariann eisini brúkar ofta.





Kjallarin hevur eisini eitt stórt vaskirúm, sum Mariann elskar. Her hevur hon eitt langt borð at leggja klæðini á, tvær vaskimaskinur og eina turkitrumlu. Hon vaskar øll handklæðini hjá hárfríðkanarstovunum, og tað kann saktans blíva heilt nógv, sigur hon. Her hevur hon eisini ein lítlan flatskerm, so hon kann hyggja sjónvarp, meðan hon vaskar klæðir.

– Hetta er tað besta rúmið í húsinum, sigur Mariann og smílist »um alt fimm-oyrað«.





Á veg úr aftur kjallaranum ganga vit ígjøgnum eitt óinrættað rúm, sum Rúni brúkar til arbeiðsrúm. Her órðnar hann alt frá elleidningum til træsmíð. Júst elið er serstakiliga spennandi júst í hesum húsinum, tí at alt kann skipast frá fartelefonini hjá Rúna. Hann tekur sína Iphone fram og vísur, hvussu hann bæði kann tendra og sløkkja ljós og stereoannlegg í nærum øllum húsinum – við fartelefonini.

– Tað skal eisini sigast, at elrokn-ingin er tvífaldað seinasta árið, flennir Rúni.





## Teirra dreymaheim

Tá rundvísingin er liðug, fara vit báðar, Mariann og eg, út á altanina at fáa okkum ein royk, meðan vit bíða eftir myndamanninum. Tá vit hava kjakast aftur og fram, um tað er ómoralskt ella ikki at brúka pels, og hvussu býtt tað er at roykja, kemur Rúni út og greiðir frá, at hann ætlar at byggja altanina størri, so tað kann verða pláss til spísiborð eisini. Higartil hevur hon ikki verið nýtt til nógv annað enn roykistað hjá Mariann. Hon vendir annars rætta vegin í mun til sólina, sigur hann.

Tá myndamaðurin er komin, hevur tikið myndirnar og keklast eitt sindur um snildu fartelefonina hjá Rúna, siga vit farvæl. Og eg fari út við kensluni av at hava verið inni í tí, sum eftir mínum tykki eru eini dreymahús: Har var bara alt!

*Bjørk K. Olsen*
*Myndir: Álvur Haraldsen*